# Misskilt nationalisma og fremmandagerandi málpolitikkur - eitt serføroyskt degenerativt fyribrigdi

REGIN EIKHÓLM



Nakað herfyri hevði Árni Dahl (Á.D.), Hattarvík, niðrandi grein um alt tað Føroyar ikki vóru, men sum Ísland hevði í yvirflóð, tí í Íslandi høvdu tey valt tann rætta leistin. Tað veri seg innan tjóðarfrælsi, frælsishugflog, samleikavirði, fólkavøkstur, expansivar inntøkumøguleikar v.m. Tann rætta framtíðin fyri Føroyar var tað íslandska modellið. Á.D. førdi fram, at aldargamla samskifti millum Føroyar og Danmark hevði ikki verið Føroyum at gagni yvirhøvur.

Stutt eftir svaraðu Hans Pauli Strøm, samfelagsfrøðingur & landsstýrismaður og Rolf Guttesen, lektari á Kbh. Universiteti, honum aftur í bløðunum, har teir hvør sær sakliga grundgóvu fyri, at tað sum Á.D. førdi fram var uttan hald í veruleikanum og uttan samanhang annars, men meiri ein einføld hugsjón ið byggir á nationalistiska ella tjóðskaparliga fáfongd við eittans endamáli, nevniliga við ósannindum at sáa missálit millum Føroyar og Danmark.

**Kejserens nye klæder syndromet**
Eg skilji væl at Á.D. ikki ynskir at svara teimum aftur, gyrdur í brókum av "Kejserens nye klæder syndrominum". Kanska situr Á.D. eftir við somu kenslum, sum Gudbrandur í Gudbrandsdali hevði, tá Ólavur hin Heilagi mælti: "Her liggur nú tann stóri gudur, tú hevur rósað tær av!" (Gudbrandskvæði ør. 32), tí stutt eftir at greinin hjá Á.D. hevði staðið í bløðunum kollapsaði hansara stóra fyrimynd.

Í mun til tað íslendska modellið stendur tað føroyska samstarvsmodellið so mikið væl, at vit hava mett okkum før fyri at veita okkara grannum fyri vestan eina hjálpandi hond fíggjarliga. Tó munur er á tøkkini, vit fáa frá íslendingum, og ta tøkk vit sendu Danmark, tá teir hjálptu okkum við milliarda stuðli / láni aftaná tey øru 80' árini.

Á sjarmu tøkk-fyri-lán ferð í Íslandi herfyri gav okkara nýggi uttanríkisráðharri íslendingum góð ráð og fortaldi, hvussu og hví vit føroyingar kláraðu krisuna so skjótt og væl. Í tí sambandi helt hann tað ikki vera neyðugt at nevna hjálpina frá okkara frændum í landssuður, tí tað var tað føroyska samanhaldið, ið gjørdi allan munin, segði hann. Men hvat eru tvær ella tríggjar milliardir í landssuður aftur ímóti trýhundrað milliónum vestureftir?

**Føroyskur fólkavilji og lívsfrælsi**
Leinkjaðir av fordums misskiltari nationalismu og einum fremmandagerandi málpolitikki, eru vit føroyingar mentalt eitt kúgað fólk. Ikki tí at onnur kúga okkum, men tí vit dyrka gamlar mytur, illgitingar og fáfongd umframt eitt yvirkompenserað stórabeiggja komplex.

At filosofiin longu í fornarni tíð royndi at skifta mythos út við logos (íspunnið kontra logiskt samanhangandi) tykist ikki at nerva droymandi føroyingin. Eins og í ævintýrunum er føroyingurin leysur av veruleikanum og tí realpolitisk uttan trúðvirði, ið eisini sæst aftur í tí politisku telvingini.

Fólkaatkvøðan í 1946 verður enn av nationalistum roknað sum ein fólkavilji fyri loysing, hóast einans 32,3% av **føroyingum** søgdu ja til loysing. Íslendska fólkaatkvøðan í 1944 hevði hóast alt 56,25% sum absalut treytað minstakrav, men tá saman um kom atkvøddu 98% av íslendingum fyri loysing.

Fyrsta reella føroyska fólkaviljan við atliti til realpolitiskan samleika og lívsfrælsi síggja vit í tíðarskeiðnum frá 1996 til 2007, tá yvir 80% av føroyingum valdu sær reytt E. S. pass heldur enn tað grøna føroyska passið. Faktum er, at fýra út av fimm føroyingum velja E. S. passið sum samleika fyri best at kunna maximera sítt lívsfrælsi og sínar innovatións møguleikar. Kanska eru vit í Føroyum við at finna út av, at í praksis er stagnerað nationalismа ikki annað enn ein realpolitiskt sápublørða, og at vegurin fram er felagsskapur og størri eindir.

**Fremmandagerandi málpolitikkur og málpoliti**
Í Føroyum tosa føroyingar føroyskt, og tað hava vit gjørt í 1000 ár, men í kjalavørrinum av naivari nationalismu hava vit - serliga tey seinastu 50 árini - fingið eina politisering av málinum og eitt málpoliti, ið hevur latið málið í eitt slag av spennitroyggju. Henda málsliga spennitroyggjan hevur lítið fyrilit fyri tí psyko- og sosiolinguistiska umframt at málið eisini verður munandi skert í tess estetisku - og emosionellu dimensión. Eisini stendur sama málpoliti fyri puristifiseringini og avlúsingini av donsk-germanskum uppruna orðum fyri síðani at substituera við íslendskum og hissini finn-upp-á-orðum. At føroyskt sum meginregla skal vera komplementert til danskt er púra burturvið og til stóran skaða fyri okkara málsliga samleika. Bókstavarnir: C, Q, W, X, Z áttu at verið ein nátúrligur partur av alfabetinum, men hesir hava verið bannlýstir av málpolitinum í mong ár, hóast vit dagliga brúka hesar bókstavar.

**Royndin hjá V. U. Hammershaimb**
Royndin hjá V. U. Hammershaimb et al. í 1846 var at skapa eitt føroyskt skriftmál til móðurmálið. Henda royndin var tentativ (royndarætlað) og ikki normativ (fyriskrivandi), tí ætlanin var nevnliga ongantíð at substituera føroyskt við íslendskt, sum okkara málpoliti annars so gjarna vil. Íslendski málbygnaðurin var ætlaður sum ein hjálpiskapulón í byrjunar fasuni.

Viss føroyska málið skal hava ein kjans og ikki enda sum inkompetent krákumál, mugu vit legalisera móðurmálið t.v.s. virða okkara faktuella mál og 1000 ára málsliga tilknýti til eitt nú danskt / germanskt. Eisini mugu vit menna okkara verandi altjóða fakterminologi og ikki niðurbróta hana, sum puristarnir annars eru farnir í holt við nú. Globaliseringin er ein veruleiki og tað er onki sum bendir á, at Einstein'sa relativitetsteoriin verður best lærd úr einum eftirgjørdum húðaskógvi.

**Babylonsk málfløkja**
Júst kunngjørdu royndarúrslitini í 4. og 6. klassa vísa týðiliga á eina babylonska málfløkju. Harragud, hvørki børn ella foreldur – og kanska illa nokk lærararnir skilja hetta politiseraða málið. Hetta er í stóran mun tað sama sum PISA-kanningin vísti. Á henda hátt gera vit okkara egnu børn til funktionellar analfabetar. Foreldrini standa hjálparleys, tí tey skilja lítið og einki av hesum nýggja finn-upp-á málinum ella nýføroyskt esperanto – eitt mál uttan sál! Vit mugu burtur frá tvingsli og happing í móðurmálinum, tí tað fremur ongan lærdóm. Eisini eiga vit at hava teir bókstavir við í alfabetinum, sum vit dagliga hava brúk fyri.

**Breitt samansett málráð**
Her er veruliga nakað hjá mentamálaráðharranum at taka upp, og sum skjótast at bera so í bandi at vit fáa eitt breitt samansett málráð - eisini umboðandi móðurmálið, og ikki sum higartil har puristarnir hava havt einarætt. Skulu vit málsliga klára okkum mugu vit legalisera móðurmálið t.v.s. brúka okkara faktuella føroyska mál og ikki umskriva tað til krákumál. Tíðin er farin frá tvingsli og happing. Á móðurmálinum brúkar vit tey orð, sum vit føla hava hugflogsekvivalent við tað vit ætla at siga. Kunnu vit ikki tað, hava vit onki móðurmál.

Her eru milliónir at spara upp á umskrivingar og kryptoseringar, umframt at tað hevði verið hópin lættari hjá børnunum, sum skulu til PISA-kanning og aðrar royndir, tí tá høvdu tey kunnu skrivað og tosað á móðurmálinum, og karakterirnir høvdu sjálvandi verið hægri.

Annars tykist málfrøðingurin, sum svarar spurningum í útvarpinum, at virða og at slóða fyri móðurmálinum, so kanska ein broyting er á veg – føroyska móðurmálinum at frama.

# Bjargið kringvarpinum og takið uppsagnir aftur!

ÓLAVUR OLSEN
tónleikari



Eg vil við hesum heita á leiðslu landsins um at taka ábyrgd av samanleggingini av Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya, ið Jógvan á Lakjuni tók stig til, og játta kringvarpinum tann pening, ið vantar í, so stovnurin kann halda fram við tí virksemi, hann í dag rekur, og tey fólk, ið nú eru í vanda fyri at missa starvið, ikki verða send til hús.

Hetta kann gerast við at hækka kringvarpsgjaldið ella við bert at játta pening in gjøgnum fíggjarlógina. Í øllum førum haldi eg, at myndugleikarnir skulu stuðla kringvarpinum í hesi samanlegging heldur enn at mótarbeiða tí.

Hví leiðslan í hesum sparingum hevur valt at siga akkurát hesum átta fólkunum upp og ikki sum vanligt fólki, ið hava starvast í styttri tíð, kunnu vit bert gita okkum til. Liggur nakað persónligt aftanfyri? Ella skulu vit gita, at hesi fólk, ið eru ovast á lønarlistanum, kosta stovninum ov nógv, og tí er loysnin at siga átta fólkum upp heldur enn kanska tólv? Um so er, verða hesir persónar revsaðir fyri at hava tænt sama stovni í 30-40 ár, og tað kann ikki vera rætt.

Hesi fólk hava lagt sína sál í hendan stovnin fyri at gera hann til tað, hann er í dag. Tað eru hesi fólkini meira enn nakar annar, sum við eldhuga, sveittabroti og brennandi áhuga fyri at geva okkum eitt væl virkandi sjónvarp og útvarp hava skapt stovnarnar. Tey vóru visioner, nýskapandi og gingu undan. Fleiri av teimum hava verið við síðan tíðina á Bryggjubakka og stóðu fremst, tá ið útvarpið flutti niðan á Norðara Ringveg. Tey eru stutt sagt søgan á stovninum. Søga, ið vit eiga at styrkja um og duga at nýta, heldur enn blaka á dyr!

Tað er ikki rætt, at menn, ið hava tænt eina lívstíð á hesum stovni, bara soleiðis í høpisleysum einkisigandi sparingum, ið væl og virðiliga kundi verið umgingnar, missa starvið.

Hesir persónar hava m. a. sendingar og aðrar uppgávur, ið eru sera týðandi fyri public service-skyldurnar hjá kringvarpinum. Teir hava ólíka vitan, ið fá her á landi annars eiga, og eru í veruleikanum einasti tráðurin aftur til søguna, vitanina og mentanarskattin hjá stovninum. Ein óumhugsað leiðsla oyðileggur sálina í sínum egna stovni.

Um sparingar skulu gerast, vildi eg hildið, at leiðslan av etiskum orsøkum skuldi valt at spart á annan hátt. Havast skal í huga, at har, sum hesi fólk eru nú, hava tey sera stórar førleikar. Men skulu tey út, kunnu fleiri teirra fáa stórar trupulleikar at finna annað arbeiði, ja, kanska er tann uppgávan ógjørlig. Eg kann ikki hugsa sær, at leiðslan í kringvarpinum vil hava hetta á síni samvitsku.

Hugsast kann eisini, at eventuellar uppgávur, ið hesir persónar hava røkt, í framtíðini mugu verða lagdar út til freelance-fólk at røkja, so kringvarpið enn kann røkja sínar public service-skyldur, og hetta er skeivt. Hví koyra dugnalig fólk til hús fyri síðan at fáa onnur inn at gera sama arbeiði? Hetta er sera vánaligur starvsfólkapolitikkur, ið neyvan hóskar einum stovni, sum í hesum sparitíðum setir bæði HR-mennarar, lýsingarfólk, journalistar, teknikarar og ein heilan her av lærlingum.

Tann virðiliga loysnin er at lata kringvarpinum tann væntandi peningin, so stovnurin framhaldandi kann røkja tær uppgávur, ið stovnurin skal røkja, og at leiðslan tekur fráboðaðu uppsagnirnar aftur.

Tað er ein beistagerð at koyra ábyrgdarfull og respekterað fólk um 60 ára aldur til hús. Vónandi tala fleiri at hesi framferðini hjá leiðsluni í kringvarpinum.

-har tað hendir